## Hósdagur 7. mars

**SVF**

18.25 DV í kvøld
18.30 Pocahontas 4:26
19.00 Tann bratta røddin e
19.30 Ein nýggj byrjan - svensk sending
20.00 Dagur og Vika
20.20 Kjak
20.45 Lívið umborð 3:4 - donsk stuttrøð
21.15 Sjálvandi brenna tey kvinnur - ensk dokumentarsending
21.55 Krimitímin: Anna Holt 12 - svensk røð (framh.)
22.55 Vald andanna II
23.35 Vald andanna - eyka
23.45 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Sailing - Ocean Race
8.30 Alpine Skiing - Men's World Cup - Live
9.30 Alpine Skiing - Men's World Cup
10.45 Alpine Skiing - Men's World Cup
11.30 Alpine Skiing - Women's World Cup - Live
12.30 Football - Kick in Action Groups
13.00 Football - Kick in Action Groups
13.30 Football - World Cup Legends
14.30 Football - World Cup Legends
15.30 Alpine Skiing - Women's World Cup
16.30 Alpine Skiing - Men's World Cup
17.15 News - Eurosportnews Flash
17.30 Football - World Cup Legends
18.30 Football - World Cup Legends
19.30 Football - Kick in Action Groups
20.00 Boxing - From the Madison Square Garden
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Rally - FIA World Rally Championship
22.45 Alpine Skiing - Men's World Cup
23.45 Rally - FIA World Rally Championship
0.15 News - Eurosportnews Report
0.30 Close

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »Ape-Man – Adventures In Human Evolution – Love«
1.00 TLZ: »In The Blood – Indian Roulette«
2.00 TLZ: »Soaring Achievements«
2.30 TLZ: »Hollywood Science - Die Hard«
2.40 TLZ: »Mind Bites«
2.45 TLZ: »Truth Will Out«
3.00 TLZ: »Brief Encounter«
3.25 TLZ: »Mind Bites«
3.30 TLZ: »The Science of Climate?«
4.00 Trouble at the Top: »The Ghost of Brocket Hall«
4.40 Science In Action
5.00 Le Club
5.15 Le Club
5.30 The Ozmo English Show
6.00 Bits & Bobs
6.15 The Shiny Show
6.35 Angelmouse
6.40 Playdays
7.00 Get Your Own Back
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Bargain Hunt
9.15 Zoo Keepers
9.45 Vets in Practice: »While The Cat's Away«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Trial of a Timelord – Terror of the Vervoids«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »For Love Nor Money«
13.30 Ready Steady Cook
14.15 Bits & Bobs
14.30 The Shiny Show
14.50 Angelmouse
14.55 Playdays
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »The Nelson Touch«
16.45 The Naked Chef: »A Bun in the Oven«
17.15 Gardeners' World 2001
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Goodness Gracious Me
20.00 Dangerfield: »Forbidden Fruit«
20.45 A little Later: »Beck«
21.00 The Young Ones: »Bomb«
21.35 Body Chemistry: »Hormone Hell«
22.30 The Big Trip
22.50 Casualty
23.40 Holiday Snaps: »Majorca/-Ibiza/Prt Grimaud/Sanremo«

**BBC WORLD**

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 Holiday (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Reporters (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Asia Today (r)
2.45 World Business Report (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 HARDtalk
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 World Business Report
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
6.45 Sport Today
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 Holiday (r)
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Europe Direct (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 Asia Today
9.45 Sport Today
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 World Business Report
11.45 Sport Today
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 The Car's The Star (r)
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 Europe Direct (r)
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Asia Today
15.00 BBC News
15.30 HARDtalk (r)
16.00 BBC News
16.15 World Business Report – followed by Weather
16.30 Talking Movies (r)
17.00 BBC News – followed by Weather
17.30 World Business Report
17.45 Sport Today
18.00 BBC News – followed by Weather
18.30 HARDtalk (r)
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 Click Online
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 World Business Report
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 Panorama
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 World Business Report (r)
22.45 Asia Today
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 HARDtalk (r)

**TV3**

5.30 Børne-hjørnet med Disney
7.00 TV-shop
8.00 Hvide løgne
8.25 Ricki Lake
9.15 Ricki Lake (G)
10.10 Horton-sagaen (G)
11.00 Horton-sagaen
11.50 Vild med dig
12.20 Pæn pige – sej sild
12.50 Melrose Place – Classic
13.45 Felicity
14.40 Baren 2002 (G)
15.10 Dawson Creek – Classic
16.05 Ricki Lake
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Susan – sød og single
18.00 Alle tiders barnepige
18.30 Baren 2002
19.00 Skadestuen
20.00 Baren 2002 – direkte
21.00 Sex and the City
21.35 The Guardian
22.30 Baren 2002 (G)
23.00 Baren 2002 – direkte (G)
0.00 Vore værste år
0.30 Simpsons
1.00 Nash Bridges
2.00 Ricki Lake (G)
2.50 Drøm videre
3.20 Vore værste år (G)
3.45 Guys like us
4.10 Sunset Beach
4.55 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Jóhann Mortensen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera: Deyðanum nær - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Bør Børson - Marius Johannesen lesur 19. og seinasta part av framhaldssøgu eftir Johan Falkberget
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás 2**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Fótbóltsprát - John William Joensen leggur til rættis, sent verður úr Studio 7
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Samkynd: Hvat er moralur? - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar – eftir C. H. Spurgeon
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.40 Møtilýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
20.55 Bankabók Trúarinnar – eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti, Okkara Dagliga Breyð, Blandaður tónleikur, o.a.
2:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
6.00 Vit gevast

## Tilvera: Deyðanum nær

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Tosað verður við kvinnu, sum sigur frá, tá hon varð sjúk og send niður á Ríkissjúkrahúsið. Brádliga gjørdist hon sera sjúk, og meðan hon var klinisk deyð, hevði hon eina vakra og merkisverda uppliving til »annað stað ella land«.Har sá hon eitt nú ommu síni, sum var deyð fyri fleiri árum síðani.

## Ein nýggj byrjan

**SVF Hóskvøldið kl. 19.30**

– Svensk sending um kvinnur í Russlandi

Tatjana er fráskild, men noyðist av íbúðarneyð at búgva saman við manninum í lítlu íbúðini. Hóast hon hevur mist arbeiðið sum verkfrøðingur, hevur hon ikki sett seg hendur í favn. Við pengum, sum koma úr vesturheiminum, skipar hon fyri skeiðum, har hon hjálpir øðrum, sum eisini eru endaði til viks í Russiska samfelagnum.

## Sjálvandi brenna tey kvinnur

**SVF Hóskvøldið kl. 21.15**

– Ensk dokumentarsending

Á ein fundi í Keypmannahavn í 1910 skeyt týska undangongukonan Clara Zetkin upp at gera 8. mars til altjóða stríðsdag fyri kvinnur. Kortini verða kvinnur um allan heim framvegis illa viðfarnar og summatíðir myrdar – bara tí tær eru kvinnur.

## Baren 2002 – Beinleiðis



**TV3 Hóskvøldið kl. 20.00**

Enn einaferð er tíðin komin til eina beinleiðis sending úr Barrini á Christianshavn. Hvør verður sendur heim hesaferð? Baren – beinleiðis verður send frá Luftkastellet á Christianshavn við vertinum Alex Nyborg Madsen.

## ÚF Morgunlestrar

**4.–9. mars**

***Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 4. mars:**
nr. 69 Jesus, kom og ver hjá mær
nr. 63 Jesus besta navnið er

**Týsdagin 5. mars:**
nr. 305 Leið meg, Guð, á lívsins veg
nr. 422 Harri, tú vár verndari og skjøldur

**Mikudagin 6. mars:**
nr. 417 Eg haldi saman hendur, Guð
nr. 404 Himmalski faðir! Tín er allur heiður

**Hósdagin 7. mars:**
nr. 419 Góði Harri, hoyr eg biði
nr. 13 Guðs kirkjulið, gitnan ger skapara tín

**Fríggjadagin 8. mars:**
nr. 421 Harri, mínar troyttu hendur
nr. 346 Lov og tøkk og allan heiður

**Leygardagin 9. mars:**
nr. 522 Guð, ger meg til eitt lítið ljós
nr. 390 Himnafaðir vár, vit biðja

# ítróttur

Nr. 42 • fríggjadagur • 1. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo



*Hóast øll feløgini neyvan vóru eins fegin, so mundi tað, um ikki annað, gleða roknskaparmenninar í FSF, at keypið av bygninginum við Tórsvøll bøtti um roknskapinum við góðum átta millíónum krónum*

# Tórsvøllur bjargar roknskapinum

**Við einari atkvøðugreiðslu bøtti Fótbóltssambandið um heldur linliga roknskapin við góðum átta millíónum krónum**

FÓTBÓLTSROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*

Tað var sjón fyri søgn á aðalfundinum hjá FSF um vikuskiftið, at føroyski fótbóltskassin ikki hevur tað serliga gott.

Við hallinum fyri 2001 upp á 1.549 tkr. er eginpeningurin hjá FSF komin niður á 766 tkr., og tá er eginpeningurin eisini betraður við 1.068 tkr., sum eru stuðul frá FIFA og UEFA í.s.v. íløgur hjá FSF.

Sostatt hava tey bæði seinnu árini, har Fótbóltssambandið enn einaferð var óheppið við lutakastinum til eina undankapping, havt rakstrarhall upp á tilsamans 1.957 tkr. Nakað sum eisini undirstrikar álvaran í orðunum hjá fyrrverandi formanninum um, at varð lutakastið hesa ferð ein keðiligt fíggjarliga, so hevði tað heilt víst fingið avleiðingar fyri landsliðsarbeiðið. Gjaldførið hjá FSF er tó framvegis so hampuligt. Tøkur peningur á bók er 1.340 tkr., og saman við hinum skjótt umsetiligu virðunum (skuldarar v.m.) er talan um ogn í umferð upp á í alt 2.522 tkr.

Stuttfreistaða skuldin er hinvegin 3.928 tkr. Av hesum er nógv tann størsti parturin, 2.968 tkr., ein kassakredittur í Føroya Sparikassa. Ein kassakredittur sum í rentubyrðu helst kostar gott og væl eitt fulltíðar starv um mánaðin.

### Tórsvøllur pyntar

Tá málið um Torsvøll var til viðgerðar á aðalfundinum, høvdu fleiri av umboðunum fyri feløgini á lofti, at tað tóktist eitt sindur djarvt, um um FSF við einum somikið lakum roknskapi gjørdi eina somikið íløgu. Verður hugsað um gjaldføri, so er einki at ivast í, at íløgan í Tórsvøll verður tung hjá FSF, men hinvegin eigur í hesum sambandi at nevnast, at hetta í stóran mun bøtir um eginpeningin hjá Fótbóltssambandinum.

Í løtuni er støðan tann, at lánið, sum FSF hevur veitt Tórsvølli stendur sum áogn við 5.050 tkr. Við yvirtøku av bygninginum verður hetta flutt til støðisogn, sum saman við nýíløguni veksur við 16.867 tkr. við tað at kostnaðurin av liðugtgerðini er 10.407 tkr.

Av hesum eru tað tó bert 2.182 tkr., sum verða fíggjaðar av FSF. Restin er stuðul frá UEFA, FIFA og Landsstýrinum, og verður soleiðis bókað beinleiðis inn á eginognina. Ein eginogn, sum soleiðis vekstur við 8.225 tkr.

## Kavin órógvar

**Aftur mikukvøldið viðførdi nógvi kavin kring landið, at hondbóltsdystir vórðu útsettir**

KAVAROK
*Jákup Mørk*

Størsta partin av vikuni hevur kavin ligið tjúkkur kring landið. Fleiri staðni hevur hetta viðført avlýsingar av bæði skúlagongd og arbeiði, og hondbólturin er einki undantak í so máta.

Týskvøldið skuldu bæði kvinnur og menn hjá StÍF og Kyndli spæla á Skála, men nógvi kavin gjørdi, at hesin dysturin í fyrsta umfari varð fluttur til mikukvøldið. Tá var veðrið nakað betri, men tó ikki somikið nógv, at kyndilskvinnurnar hættaðu sær allan vegin inn á Skála. Nakað av jarðroki var við Streymin, og tá tað ikki tóktist sannlíkt ,at hetta fór at batna, sum kvøldið leið, hildu tær tað vera skilabest at bíða við dystinum.

Kappingarnevndin gekk sjálvandi áheitanini frá Kyndli á møti, og boðaði samstundis mansliðnum hjá Kyndli og StÍF frá, at eisini teirra dystur var útsettur. Tað sama varð dysturin millum mansliðini hjá Neistanum og Tjaldri, sum eftir ætlan skuldi verða hóskvøldið.

Enn er ikki greitt, nær útsettu dystirnir skulu avgreiðast, men hondbóltskalendarin hevur okkurt glopp í komandi viku, har Neistin og Tjaldur kunnu spæla, meðan StÍF og Kyndil helst mugu bíða til miðskeiðis í aðru viku við sínum dystum.

# Tryggingar koma

**Aðalfundurin hjá FSF samtykti, at til komandi aðalfundin skal nevndin hava snikkað eitt uppskot til, sum á onkran hátt tryggjar bæði leikarar og feløgini móti missi frá langtíðarskaða**

TRYGGINGAR
*Jákup Mørk*

Í fleiri ár hava føroysku fótbóltsfeløgini tosað um, at hvørki tey ella leikarar teirra eru nøktandi tryggjaði ímóti tí inntøkumissi, sum ein drúgvur skaði kann hava við sær.

Fleiri ferðir hevur málið verið uppi at venda á aðalfundum, men fram til seinasta aðalfundin var einki ítøkjuligt uppskot lagt fram hesum viðvíkjandi.

Nú er tó gongd komin á málið. Tey tíggju feløgini í fyrstu deild løgdu nevnliga uppskot fyri aðalfundin, har heitt varð á FSF um at taka upp samráðingar við tryggingarfeløgini, soleiðis at leikarar kunnu verða tryggjaðir best møguligu viðgerð, tá skaðar stinga seg upp, eins og bæði leikarar og feløg kunnu verða tryggjað móti fíggjarliga missinum, sum skaðar hava við sær.

Í fyrstu syftu var uppskotið orðað soleiðis, at nevndin í FSF fekk álagt at skipa soleiðis fyri, at allir leikarar í 1. deild verða tryggjaðir, og at feløgini skulu tryggjast móti fíggjarligum missi, tá leikari gerst langtíðarskaddur.

### Drúgt orðaskifti

Tað stóðst hampuliga drúgt orðaskifti av hesum málinum á aðalfundinum hesaferð. Mortan Poulsen, sum umframt at vera nevndarlimur í FSF eisini er ein av stjorunum í Tryggingarfelagnum Føroyar førdi fram, at ein slík trygging vildi verið rættiliga dýr, um hon varð skipað eftir sama leisti sum uttanlands, men hinvegin helt hann tað vera skilagott, at málið varð kannað nærri.

Umboð fyri fleiri av feløgunum høvdu hinvegin á munni, at tað væl kundi gerast nógv dýrari, um ein tryggingarskipan ikki fekst í lag. Eitt skifti hótti orðaskiftið við at gerast tað bera keglarí um einstøk mál, sum hava rakt ávís feløg, samstundis sum feløg uttan fyri bestu deildina og dómarar høvdu ilt við at skilja, at talan bert skuldi verða um leikarar og feløg í bestu mansdeildini.

### Bloytti upp

Tað bøtti tó um, tá Niclas Davidsen av Toftum tók orðið. Heldur enn at krevja, at teksturin í uppskotinum skuldi takast bókstaviliga, legði hann dent á, at hetta meira var fyri at gera vart við, at nú mátti okkurt henda. Saman við fundarstjóranum broytti aðalfundurin eftir hetta uppskotið, soleiðis at nevndin nú hevur fingið eina áheitan um, at til komandi aðalfundin skal eitt uppskot um tryggingar fyriliggja. Hesum tóku 20 feløg undir við, meðan tvær atkvøður vóru blankar, og so var tað málið í fyrstu syftu avgreitt frá aðalfundinum.